# Miðvikan

Framhald frá síðu 15



*Eskild Norðbú, sum er heimildarmaður til søguna um pápa sín og myndina*



*Andrea, systir Kjølbro, giftist ikki. Hon misti tveir dreingir á sjónum*



*Jógvan Thomassen skrivaði sjálvur sangin, sum varð sungin yvir honum sum lík*



*Húsini á Steigini í Miðvági, har ætlanin var, at Andrea og Jógvan skuldu giftast inn*



***Jógvan Thomassen og Jóan Magnus Høgnesen fóru í somu grøv. Andrea liggur undir liðini á teimum. Myndirnar í samband við Andreu og Jógvan eru fingnar frá Honnu Hansen í Miðvági, sum eisini er ein kelda um Jógvan***

ein kann ikki annað enn undrast yvir, at ein tilvildarligur dani bert eftir munnligari frásøgn, kann hava gjørt ein tekning, sum líktist so væl. Tað áhugaverda er eisini, at hetta er mynd sum enntá er í litum.

Sjálvur var eg fyri 10 árum síðan til eina stutta viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum. Tá gav eg teimum ljósprent av hesi myndini saman við frásøgn um hendingina

Hon varð handað listafelagnum á ríkissjúkrahúsinum. Myndin og søgan um hana varð eisini endurgivin í starvsfólkablaðnum hjá ríkissjúkrahúsinum, sum kallast Riget.

Tískil kann sigast, at myndin er komin aftur haðani hon kom.

## Jógvan hevði sangin til jarðarferðina í lummanum

Jógvan Thomassen var maðurin, sum doyði, eftir at hann var komin á land. Hann var stak illa fyri og hevði fingið snudd undir bjargingini, táið hann fekk eina lastalúku á seg, so blóðið stakk áðrenn hann kom upp á land.

Jógvan mátti hálast upp á bakkan, hann kláraði ikki at ganga rættuliga langt. Tískil varð hann settur undir ein varða, so menn kundu koma eftir honum aftur. Hetta var sjálvsagt gjørt so skjótt tað var gjørligt, men tá var hann deyður.

Her er eisini ein sjáldsom søga. Í lummanunum hjá honum varð tá funnin ein sangur, sum hann hevði yrkt umborð, og ljóðaði hann soleiðis:

### Hvør veit at siga tíð ella stund

Lag: Paa Golgata min Frelser led.

Hvør veit at siga tíð ella stund
tá eyga leggjast skal í blund
og ikki opnast aftur her,
tí kaldi deyði komin er.

Niðurlag:

:,: Kom vinur kom, kom vinur kom
og kasta teg í Jesu favn,
tí bara trúgv á krossins verk
teg føra kann í Himmalhavn. :,:

Hann ræður sum tær lívið gav,
nær skerast skal lívstráður av
og orð hans minna teg og meg,
at lívið er á smala veg.

Hans kærleiks gerð er undurfull,
og meira verd enn góðs og gull,
tonk, teg mín vinur elskar hann,
tí Kristi blóð á krossi rann.

Kom tú sum vorðin gamal er,
og tú sum reyðar kinnar ber,
hoyr Jesus rópar, svara jú
eg komi, Jesus, frels meg nú.

Hesin sangur varð fyrstu ferð sungin, tá ið líkini nakrar dagar seinni komu til Reykjavíkar. Tað kann sigast, at hann hóskaði væl til umstøðurnar

Hann varð eisini sungin á minningarhaldinum í Íslandi fyri 10 árum síðani, sum greitt verður frá í komandi parti. Eisini er sangurin at finna í Missiónssangbókini.

Johannes Andreas Næs í Havn, ættaður úr Hvalba, minnist, at tá ið hann var ungur og var lærari í Suðuroy, varð hesin sangur nógv sungin á missiónsmøtum.

Afturat hesum sanginum eru tveir aðrir sálmar eftir Jógvan í somu songbók.

Jóhannes Andreas Næs hevur eisini eina áhugaverda frásøgn í tí sambandinum. Hana fekk hann frá Alfred Petersen í Klaksvík, sum var ein kendur sjómanstrúboðari, og sum eisini virkaði í Reykjavík, tá teir á Ernestinu komu hagar. Alfred greiddi frá, at tá ið Jógvan fór avstað hendan túrin við Ernestinu, kom Jógvan inn til hansara og lat honum í varðveitslu nakrar sálmar, hann hevði yrkt. Hetta hugsaði Alfred ikki so nógv um beint tá, men aftaná hugsaði hann sjálvsagt um Jógvan kann hava kent okkurt á sær.

Men hetta má eisini merkja, at sangin í lummanunum hevur Jógvan yrkt umborð.

Jógvan var virkin í Heimamissiónini. Í Sandavági og Miðvági var fyrsta veking innan fyri kirkjuna, og var hon í 1905. Her var longu sunnudagsskúli í 1912. Jógvan kann hava verið við longu tá.

Tað kann verða nevnt, at ein annar samtíðarmaður hjá Jógvani var Bernhard Henriksen úr Sandavági, sum var kokkur við Nólsoynni, tá ið hon gekk burtur í 1934. Hansara dagbók frá 1930, sum eisini lýsir hansara virksemi innan heimamissiónina, er eitt varandi minni um hann.

## Andrea misti tveir dreingir á sjónum

Jógvan var 34 ára gamal. Hann var trúlovaður við Andreu f. 1899, sum var systir Jógvan Kjølbro og Dáva í Gerðum.

Tey skuldu giftast og skuldu búgva í húsinum hjá foreldrum hansara í Miðvági, sum Jógvan hevði umvælt.

Hetta var sjálvsagt eisini hart hjá Andreu, tí hetta var aðru ferð, hon misti ein drong á sjónum. Fyrri drongurin var Jóannes úr Skopun, sum slerdi út við útróðrarbátinum Royndini í 1919. Jóannes hjá Dáva, sum varð føddur sama ár, varð uppkallaður eftir honum.

Andrea arbeiddi á skrivstovuni hjá Kjølbro. Hon gjørdist ikki gomul heldur. Hon doyði í 1962, 63 ára gomul.

Andrea og Jógvan vórðu tó sameinað í deyðanum. Tey liggja lið um lið í kirkjugarðinum í Klaksvík.

Tað verður sagt í Miðvági, at Jógvan var sera musikalskur og dugdi eisini at spæla violin. Violinin hevur ikki verið at finna aftaná Ernestinu. Hann man helst hava havt hana við sær umborð. Nótarnir hjá honum liggja heima hjá ættini.

Beiggi Jógvan, Tummas, var eisini við Ernestinu. Tað hevur uttan iva verið hart hjá honum at fara frá beiggjanum, tá ið hann ikki orkaði at ganga longri.

Jógvan var ættaður úr húsinum á Steigini í Miðvági. Foreldrini vóru Elsebeth og Kristian Julius Thomassen.

Jógvan lærdi til skipara í 1918 hjá Jens í Dali í Havn. Ein av floksfeløgunum var Erik Mohr, seinni kendur skipari á ferðamannaskipinum Tjaldur.

## Fleiri fórust á sjónum

Sum ofta var tá í tíðini, var hetta ikki einasta vanlukka á sjónum, sum hetta hús kom út fyri. Beiggin Edvard fórst við Florence í 1927. Tað er sjáldan, at okkara fiskimenn hava verið í eini so ræðuligari støðu sum við hesi vanlukku. Florence hevði samanstoyt við Hafstein, og Florence fór at søkka.

Stóri bátur brotnaði av samanstoytinum, og tað var bert pláss fyri 10 av teimum 17 monnunum í tí minna bátinum. Her skuldi bókstaviliga veljast, hvør ið skuldi

Framhald á síðu 33